nøvn nú nøvn nú

Heilsanir



Góða elskaða Annika.
Hjartaliga tillukku við 6-ára føðingardegnum, ið var tann 22. juli. Góða eydnu við skúlanum.
Kærar heilsanir og 1000 massar og klemm frá ***mammu, babba og Helenu***



Góði Ári
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum sum var 6.8. Mamma og pápi tín fáa eisini eina heilsan. Jesus pápi signið framtíð tykkara.
Heilsan ***Berit***



Góði elskaði abbin!
Hjartaliga tillukku við fimmti ára føðingardegnum 8/8.
Heilsan ***lítli Páll***



Góða fitta Poula
Hjartaliga tillukku á 15 ára degnum 10. august. Harrin signi framtíð tína.
ynskja ***Martha og Siri***



Góða Fríða-fastur
Hjartaliga tillukku við 68 ára føðingardegnum sum var 7.8. Jesus pápi signi framtíð tína.
Heilsan ***Berit***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **20,- kr.**

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

Tiltøk

Tórshavnar Hvítusunnusamkomu
Sunnudagin morgunmatur kl. 11, evangeliskt møti kl. 18. Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnukvøld kl. 18: YM-møti við Herluf og Tove Heinesen. Innsavnan til Ytrimissión.

Rhema á Hálsi
Hvørt sunnukvøld eru vit at hoyra á Atlantic Radio.

Samkoman Immanuel
Møti í kvøld kl. 20.30.

Frá Kelduni í Skálafirði
Fríggjakvøldið 13. august kl. 21.00. Bøn og breyðbróting.
Leygardagin 14. august kl. 21.00. Opið hús.
Sunnudagin møti kl. 19.00 við Dagunn og Kaj Olsen.

Betania Porkeri
Ragnar Nielsen talar á møtinum í kvøld kl. 20.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18 verður møtið við Andreassen presti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Ónsdagin kl. 20 er uppbyggingar fundur.

Samkoman Sion, Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Javni
Skrivstovan í N. Finsensgøtu 32, tlf. 314827, fax 310557 er opin soleiðis:
mánadag er stongt,
týsdag kl. 10-12,
mikudag kl. 10-12,
hósdag kl. 10-14
fríggjadag kl. 10-12.
Frítíðarklubbin hevur ymiskar aktivitetir í kjallaranum hjá Javna. Nærri fæst at vita um hetta, við at venda sær til skrivstovuna.

Giktfelag Føroya
Kontórið í M.B.F. húsinum, Íslandsvegur 10c, hevur stongt frá 28.6.99 vegna summarfrí. Lýst verður tá opið verður aftur.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til kl. 15.00. Tlf. 1.7597, skrivitlf. 1.6929 fax 1.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er stongd vegna summarfrí, frá 26. juli til og við 29. august.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er hvønn dag mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur og bløðini eru at fáa hvønn dag.
Til 15. aug. hava vit opið frá kl. 14.00-18.00.
Býarsavnið hevur myndaframsýning av gomlum myndum í Tilhaldinum í Tórsgøtu 21.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomnin.
Inngongd frá Grasagarði.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

AA-fundur í Havn:
Vaskaríið kl. 20.00.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Felagið Føroyar-Kuba
Skrivstova og felagshøli felagsins er í Bringsnagøtu 10, Tórshavn. Postadressan er:
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf. og fax 313016.
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com

Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur, tá skúlarnir byrja.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta í Hirtshals

Sjómansheimið »Ørkin«
Brautarholt 29,
105 Reykjavík
Sunnudag møti kl. 14.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Nærri upplýsingar á tlf. 009 354-568-0777

Sunnudagsskúli í Keypmannahavn
Sunnudagsskúli er hvønn sunnudag kl. 14 á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade, og í Eliaskirkjuni, Vesterbrogade 49. Øll eru hjartaliga vælkomin. Meira fæst at vita frá Jan Johannessen,
tlf. (0)43623737-1502.

Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 96 99 95, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/ 26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

sosialurin
www.sosialurin.fo